Fylgiskjal 4

Fiskivinnuráðið

Fundur 2020/8

Stutt frásøgn frá fundi í Fiskivinnuráðnum týsdagin 29. september 2020 kl. 15.00-16.00.

Skrá:

0. Góðkenning av dagsskrá

1. Uppskot til

   Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjófeingi (Sjófeingislógin)
   (Fiskidagaskipanin, leingjan av gildistíð á rættindum, føroyskir smábátar, tillagingar og fylgibroytingar)

   Freistin at koma við viðmerkingum er sett til mikudagin 30. september 2020.

2. Ymiskt

Ad. 0
Dagsskráin góðkend.

Ad. 1
Uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjófeingi (Sjófeingislógin (Fiskidagaskipanin, leingjan av gildistíð í rættindum, føroyskir smábátar, tillagingar og fylgibroytingar)..

Umboðið fyri Meginfelag Útróðrarmanna vísir á, at lógarbroytingin frá juni 2020, sum fær virknað frá 1. jan. 2021, fer at hava við sær, at fiskidagatalið í bólki 4 minkar umleið 30%, og at hesir dagar verða lagdir afturat bólki 3 (umrokningarfaktor 0,6). Umsitingarætlanin frá mai 2019, sum allir partar hava tikið undir við, tekur útgangsstøði í dagatalinum í 2019. Tá 30% av døgunum verða fluttir úr bólki 4 til bólk 3, áðrenn umsitingarætlanin fer at virka, hevur tað við sær, at umsitingarætlanin er skeiklað beinan vegin.

Fiskivinnuráðið vísir á, at tilvísingin í §19 stk. 4 í uppskotinum til §19 skal helst vera til §18. Sami mistak tykist at vera komið fyri í §28 stk. 2.

Ad. 2
Einki var undir ymiskt.

Fundarfrásøgn lisin og góðkend.

Fundur lokin kl. 16.00

Jóanna Djurhuus, formaður

Jákup Mørkøre, skrivari